

Stril Explorer við bryggju í Havn herfyri. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Kortleggja havbotn millum Ísland og Bretland til elkaðal

**Jan Müller**

29.06.2015 - 16:45

Oljan.fo

Tvær reisir seinastu vikurnar hevur norska frálandsskipið, Stril Explorer, verið í føroyskari havn, fyrst í Havn og seinni í Sørvági. Oljan.fo veit at siga frá, at skipið er til arbeiðis á havdýpinum millum Føroyar og Ísland. Tað hevur fingið til uppgávu at kortleggja tann djúpasta partin av havbotninum við tí fyri eygað einaferð í framtíðini at leggja ein elkaðal úr Íslandi til Bretlands, umvegis Føroyar. Hetta er ein gomul verkætlan, sum við jøvnum millumbili hevur verið frammi í bæði Íslandi, Føroyum og Bretlandi. Spurningurin er, hvussu kann stóri bretski marknaðurin fáa atgongd til bíliga orku úr Íslandi og ber til at knýta Føroyar upp í ein elkaðal eisini.

Sambært norskum miðlum er tað Atlantic Superconnection Corporation (ASC), sum hevur latið svensku fyritøkuna MMT, ið er partnari hjá Reach Subsea, uppgávuna at kortleggja havbotnin millum Ísland og Bretland. Reach Subsea hevur heimstað í Haugesund og boðar umvegis virðisbrævamarknaðin frá kortleggingini av havbotninum. Hetta skal vera longsta kortlegging fyri ein háspennings sjókaðal. Kortleggingin av havbotninum millum Ísland og Bretland verður gjørd við einum ROV kanningarfari umborð á Stril Explorer. MMT skal gera eina sokallaða batymetriska og fysiska kortlegging av havbotninum, har hann er djúpastur millum Ísland og Bretland. Kanningin er 1470 kilometrar long og verður framd komandi tveir mánaðirnar. Stril Explorer, sum hoyrir til reiðaríið Simon Møkster, er serútgjørt til at útinna uppgávur á havbotninum.

Oljan.fo skilur, at tað nú er komið veruligt lív í ætlanina at leggja ein elkaðal millum Ísland og Bretland, umvegis Føroyar. Herfyri vóru umboð úr Íslandi og Bretlandi á fundi við orkumyndulgeikar í Føroyum um ætlanina.


